## Kyndil-fløga ávegis

Hondbóltsfelagið Kyndil verður 50 ár í næstum, og sum vera man, so verður nógv gjørt burtur úr degnum. Umframt veitslu, bókaútgávu og annað, er eisini ein fløga ávegis. Á móttøku í Müllers pakkhúsi 10. mars er ætlanin at spæla fløguna alment fyri fyrstu ferð, men í leikskránni til seinasta heimadyst varð boðað frá, at tey kviku kunnu ogna sær fløguna undan hesum. Hetta tí tey fyrstu 100, sum rinda 100 kr. á bankakonto hjá felagnum, fáa fløguna fyri hendan prísin, heldur enn tær 169, sum verða galdandi fyri øll onnur.

-mørk

## Byrial vann á AGF

AC Horsens vann um vikuskiftið seinasta venjingardystin, áðrenn superligan byrjar aftur. Dysturin var ímóti AGF, og úrslitið var 2-1 til AC Horsens. AGF hevði leikliga yvirvág í dystinum, og seint í dystinum, tá ið støðan var 1-1, brendi AGF brotsspark. Dysturin endaði tí við, at Johan Byrial Hansen og hinir í AC Horsens stjólu sigurin við einum máli seint í dystinum.

## Claus var ikki við

Føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen var ikki við á liðnum hjá Coventry, sum spældi landskappingardyst ímóti Southampton leygardagin. Tvey mál komu í dystinum, og tey komu bæði seinastu løtuna. Fyrst var tað Southampton, sum legði seg á odda, men tveir minuttir fyri leiklut fekk Coventry brotsspark, og tað skoraðu teir uppá.

## Atli nær við at skora

Danska 1. deildarliðið Fem spældi um vikuskiftið venjingardyst í Landskrona, og t-veir føroyskir spælarar vóru á vøllinum. Bæði Jónas Tór Næss og Atli Gregersen byrjaðu dystin í verjuni hjá Frem, og heimasíðan hjá Frem skrivar, at verjan stóð stinn, meðan álopsspælið hjá liðnum var meira svikaligt. Atli Gregersen var um reppið at skora seint í dystinum, tá ið hann stútaði eitt hornaspark ímóti málinum. Á sjálvari málstrikuni bjargaði ein útispælari, og tí endaði tað við, at Landskrona vann dystin 1-0.

# Fleyr og Dráttur standa til at vinna FM-heitini

**Menninir hjá Fleyr og kvinnurnar hjá Drátti standa við gullinum í hondini, men tey kunnu ikki lyfta hendurnar upp um høvd, fyrr enn eftir næstu dystirnar. Eitt lítið fet skal takast afturat, áðrenn allur teortiskur ivi um FM-heitið er av vegnum**




*Fleyr vann dystin ímóti SÍ við 3-0, og nú er havnaliðið aftur á flogbóltstrúnuni í Føroyum*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nú er bert ein evarska lítil teoretiskur møguleiki fyri, at onnur lið enn Fleyr og Dráttur kunnu vinna meistaradeildina hjá ávíkavist monnum og kvinnum.

Oddaliðini vunnu um vikuskiftið sínar dystir púra trygt, og harvið tryggjaðu tey sær mest sum eisini FM-heitið.

Men tað er eitt lítið men – av teoretiskum slag.

Mjølnir hjá monnum og TB hjá kvinnum hava framvegis ein lítlan møguleika at fáa oddaliðini aftur, men tann møguleikin er so lítil, at hann tykist óveruligur undan seinastu tveimum dystunum.

**Fleyr setti seg á trúnuna**

Menninir hjá Fleyr spældu um vikuskiftið ímóti SÍ, og fyri Fleyr var tað umráðandi, at liðið vann dystin, ella vildi seinasti dysturin ímóti Mjølnir í Klaksvík gerast avgerandi fyri teir.

Og Fleyr loysti sína uppgávu til fulnar, tí teir vunnu dystin á SÍ 3-0.

Fyrsta settið vann fleyr 2-5-20, men í øðrum setti skuldu teir veruliga stríðast fyri at vinna. SÍ royndi alt, teir kundu, men at enda máttu teir lúta, og Fleyr vann settið 30-28. Hetta tóktist gera enda á SÍ, tí triðja settið vann Fleyr 25-19.

Fleyr er nú fýra stig frammanfyri Mjølnir, og tveir dystir eru eftir at spæla. Mikukvøldið skal Fleyr spæla ímóti Nøvuni, sum einki sett hevur vunnið í kappingin higartil. Tað verður ein sensatión av teimum stóru, um Fleyr ikki vinnur tann dystin.

Tá ið teir hava vunnið dystin, kunnu teir endaliga kalla seg føroyameistarar, tí tá er seinasti dysturin ímóti Mjølnir uttan t‡dning í stríðnum um gullið.

**Dráttur trygt á veg**

Hjá kvinnunum tók Dráttur eitt stórt fet ímóti gullinum, tá ið tær um vikuskiftið vunnu 3-0 á SÍ.

Øll trý settini endaðu við úrslitinum 25-19 til Drátt, og talan var tí um ein tryggan sigur til liðið úr Vágum.

Dráttur er fýra stig frammanfyri TB áðrenn seinastu tveir dystirnar, og harafturat hevur Dráttur nógv betri settmun. Tað skal tí nakað heilt serligt til, um Dráttur skal snáva nú.

Næsti dysturin hjá Drátti er ímóti júst TB, og tá er kravið til TB, at tær skulu vinna 3-0. Gera tær tað, so hevur Dráttur framvegis ein møguleika, tí í seinasta umfarinum spælir Dráttur ímóti botnliðnum Mjølnir.




*Ein lítil møguleiki er fyri, at Fleyr kann snáva, men so skal ársins størsta sensatión henda, tí Fleyr skal tapa ímóti Nøvuni, sum einki sett hevur vunnið í kappingini í vetur*

**Flogbóltsstøður**
**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 18 | 16 | - | 2 | 51 | 22 | 29 | 22 |
| 2 TB | 18 | 11 | - | 7 | 40 | 24 | 16 | 18 |
| 3 ÍF | 18 | 10 | - | 8 | 40 | 31 | 9 | 14 |
| 4 SÍ | 18 | 10 | - | 8 | 37 | 34 | 3 | 13 |
| 5 KÍF | 18 | 4 | - | 14 | 20 | 47 | -27 | 7 |
| 6 Mjølnir | 18 | 3 | - | 15 | 18 | 48 | -30 | 4 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 14 | 12 | - | 2 | 38 | 15 | 23 | 17 |
| 2 Mjølnir | 14 | 9 | - | 5 | 33 | 17 | 16 | 14 |
| 3 SÍ | 14 | 8 | - | 6 | 30 | 23 | 7 | 10 |
| 4 ÍF | 14 | 6 | - | 8 | 24 | 28 | -4 | 9 |
| 5 Nøvan | 14 | 0 | - | 14 | 0 | 42 | -42 | 0 |

**Meistaradeild kvinnur**

**KÍF-ÍF 0-3**
Dráttur-SÍ 3-0 (25-19, 25-19, 25-19)
TB-Mjølnir 3-0 (25-14, 25-19, 25-21)

**Støðan**

| | D | V-T | Sett | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1. Dráttur | 18 | 16-2 | 51-22 | 22 |
| 2. TB | 18 | 11-7 | 40-24 | 18 |
| 3. ÍF | 18 | 10-8 | 40-31 | 14 |
| 4. SÍ | 18 | 10-8 | 37-34 | 13 |
| 5. KÍF | 18 | 4-14 | 20-47 | 7 |
| 6. Mjølnir | 18 | 3-15 | 18-48 | 4 |

**Meistaradeild menn**

Nøvan-ÍF 0-3 (20-25, 17-25, 9-25)
Fleyr-SÍ 3-0 (25-20, 30-28, 25-19)

**Støðan**

| | D | V-T | Sett | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1. Fleyr | 14 | 12-2 | 38-15 | 17 |
| 2. Mjølnir | 14 | 9-5 | 33-17 | 14 |
| 3. SÍ | 14 | 8-6 | 30-23 | 10 |
| 4. ÍF | 14 | 6-8 | 24-28 | 9 |
| 5. Nøvan | 14 | 0-14 | 0-42 | 0 |